Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Tilboð til giktasjúklingar í Føroyum

Spurningar:

1. Hvørji líknandi tilboð eru ætlað til giktasjúklingar í Føroyum, nú túrarnir til Kroatia eru partvíst strikaðir?
2. Hvussu ætlar sjúkrahúsverkið at skipa viðlíkahaldsvenjingina og viðgerðina hjá giktasjúklingum í Føroyum í framtíðini?
3. Er peningalig sparing orsøk til stóru umleggingarnar/broytingarnar á giktaøkinum í Føroyum farna árið?
4. Hvussu nógvir giktasjúklingar, sum søkja heilsubót í sjúkrahúsverkinum, eru virknir á arbeiðsmarknaðinum í dag?

Viðmerkingar:
Seinastu tíðina hevur javnan verið alment kjak um stóru broytingarnar innan giktaøkið í Føroyum. Árligu viðlíkahaldsvenjingarnar vórðu avmarkaðar fyri giktasjúklingar í Føroyum, tá túrarnir til Kroatia vórðu avmarkaðir til nøkur heilt fá.

Eisini hevur rumbul staðist av læknastarvssetanum og roteringsskipanum av útlendskum læknum, sum virka á giktaøkinum á Landssjúkrahúsinum.

Talið á giktasjúklingum er stórt í Føroyum. Hetta eru sjúklingar, sum hava ymiskan tørv á heilivági og viðgerðum fyri at klára gerandisdagin og fyri at hava eitt virkið familjulív og arbeiðslív. Viðlíkahaldsvenjingar og viðgerðir, saman við heilivági, eru grundarlagið undir einum dygdarlívi hjá hesum sjúklingum.

Fleiri persónar við gikt liva við áhaldandi pínu og mugu tí javnan hava linna fyri at kunna virka í samfelagslívinum. Tørvur er á øllum fólkum á arbeiðsmarknaðinum og tí er viðkomandi at uppraðfesta viðlíkahaldsvenjingar og viðgerðirnar hjá giktasjúklingum, eins og øðrum sjúklingum, sum virka partvíst ella fulla tíð í dagliga arbeiðslívinum.

Spurningurin er, hvør persónligi kostnaðurin og samfelagskostnaðurin verður, um tænastan lækkar í framtíðini, og giktasjúklingar mugu av arbeiðsmarknaðinum vegna vantandi viðgerð og viðlíkahaldsvenjing.

Fyri m.a. at fáa greiðu á framtíðarætlanunum á giktaøkinum og fyri at fáa greiðu á óvissum á økinum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 25. august 2022

Jóhannis Joensen